# Norska fiskivinnan misnøgd

**Sambært NTB, heldur Norges Fiskarlag, at myndugleikarnir í Noregi hava gjørt eitt vánaligt arbeiði í samráðingunum við føroyingar um nýggjan fiskiveiðisáttmála**

**FISKIVINNA**
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



*Jupiter er eitt av okkara svartkjaftaskipum. Norskir fiskimenn eru misnøgdir um atgongdina hjá teimum at veiða svartkjaft undir Føroyum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Norges Fiskarlag er ikki nøgt við fiskiveiðiavtaluna, sum Føroyar og Noreg undirskrivaðu í síðstu viku.

Tað eru serliga reglurnar um atgongd at fiska svartkjaft og makrel hjá hvørjum øðrum, sum ónøgdin er um.

NTB veit at siga, at Norges Fiskarlag vísti sína ónøgd við at taka seg aftur úr norsku samráðingarnevndini, áðrenn avtalan fyri 2006 varð undirskrivað.

### Ikki nøktandi

Norges Fiskarlag heldur, at Noreg átti at fingið eina nøktandi atgongd í føroyskum sjógvi at veiða svartkjaft á sama hátt, sum landið hevur rokkið móti vegis ES.

– Tilboðið úr Føroyum lá alla tíðina langt niðanfyri norska kravið, sigur felagið.

Avtalan snýr seg um, at norsk svartkjaftaskip í mesta lagi kunnu fiska 4% av síni strandalandskvotu í føroyskum sjógvi. Tað merkir, at um heildarveiðan av svartkjafti verður 1,5 milliónir tons, kunnu norðmenn fiska út við 60.000 tons í føroyskum sjógvi í ár.

### Betri avtala

– Norges Fiskarlag fer framhaldandi at royna at fáa eina betri svartkjaftaavtalu í lag við Føroyar, sigur formaðurin, Reidar Nilsen við NTB.

**Bakaralærlingur** søkist til Mylnuna



Ert tú morgunfrískur ella -frísk og hevur hug til eitt gott og spennandi arbeiði, so send eina umsókn til okkum, ella ring. Lærutíðin er 4 ár við skúlagongd í Danmark.

mylnan

Send umsóknina til:
Mylnan, c/o Eirikur Magnussen, Box 1059, 110 Tórshavn, ella ring til Eirikur á tel 214456.

miðlahúsið í Vágsbotni



**Hvønn dag í januar mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.**

**Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.**

**Sendið okkum loysnirnar innan 3. februar og viðmerkið brævbjálvan "Sudoku".**

**Vinningurin er ein Samsung E730 + eitt Teletíðarhald frá Føroya Tele. Virði 3.295 kr.**

**Henda fartelefonin hevur so at siga alt sum skal til í eini fartelefon. Megapixel-kamera, video, MP3, Bluetooth, FM-radio, 96 Mb minni v. m. Eisini hevur E730 ein TFT-skerm við 262.000 litum.**

**Drigið verður í fyrstu vikuni í februar**

FØROYA TELE

# SUDOKU JANUAR KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7 | | | | 5 | 1 | | | |
| | 6 | | | 4 | | 2 | | 8 |
| | 9 | | 3 | 8 | | 5 | | 6 |
| | 5 | 2 | | | 7 | | | 9 |
| | 3 | 1 | | | | 4 | 2 | |
| 6 | | | 9 | | | 1 | 5 | |
| 8 | | 9 | | 1 | 3 | | 4 | |
| 2 | | 5 | | 7 | | | 3 | |
| | | | 4 | 9 | | | | 2 |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | | | 2 | 1 | 6 | | | 9 |
| | | 7 | | | | 5 | | |
| | | 1 | 5 | | 4 | 6 | | |
| | 7 | | | 9 | | | 6 | |
| 9 | | | | | | | | 2 |
| | 2 | | | 3 | | | 4 | |
| | | 9 | 4 | | 1 | 3 | | |
| | | 2 | | | | 4 | | |
| 1 | | | 3 | 5 | 9 | | | 8 |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 3 | 5 | | | | 6 | | 4 | 9 |
| 8 | | | | 7 | 9 | | | 5 |
| | | | 8 | | | | | |
| 9 | 3 | | | | | 2 | | |
| | 4 | | | | | | 1 | |
| | | 2 | | | | | 5 | 4 |
| | | | | | 4 | | | |
| 2 | | | 9 | 8 | | | | 3 |
| 4 | 1 | | 7 | | | | 8 | 6 |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | | | 5 |
| | | 6 | 4 | 1 | | 9 | 3 | |
| | | 5 | | 3 | | | 6 | |
| | | | 8 | | | | 7 | 4 |
| | | | | | | | | |
| 8 | 9 | | | | 1 | | | |
| | 7 | | | 8 | | 1 | | |
| | 2 | 4 | | 6 | 9 | 3 | | |
| 5 | | | | | | | | |

TRUPUL

NAVN: ______________________ BÚSTAÐUR: ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin | Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www. sosialurin.fo